# Eingin megnar at steðga meistarunum

**Tað er rættuliga kostnaðarmikið hjá B36 at hava TB kompleks, og fyrsti VB sigurin í tveir mánaðir ber við sær, at tað nú brennur undir fleiri øðrum**

13. UMFAR SAMANUM

*Jóannes Hansen*


*B36 megnaði heldur ikki hesa ferð at skora móti TB, og so máttu teir síggja frástøðuna upp til HB økjast í fimm stig*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í toppinum gongur tað, sum tað plagar at gera. HB er trífaldur meistari, og tað tykist verða torført hjá nøkrum av hinum at megna at gera nakað við meistaraliðið, sum hevur beina kós ímóti fjórða meistaraheitinum á rað.

Eftir tríggjar GÍ sigrar á rað var tað ikki sørt av spenningi, um tað fór at eydnast GÍ, sum ofta áður hevur staðið seg væl á heimavølli ímóti HB, at basa oddaliðnum. Tað gjørdu teir á ongan hátt. HB vísti kanska mest sannførandi avrikið á árinum, og so varð tað aftur hesa ferð staðfest, hvussu risa stóran týdning tað hevur í dagsins fótbólti at hava framúr góðan skjútta, tá ið tað snýr seg um deyðbóltsstøður. Rasmus Nolsøe tykist vera gull verdur hjá HB!

Onkra ferðina hevur spurningurin um manngarðar verið viðgjørdur. Í Saprigerði varð tað enn eina ferð staðfest, at tað ofta er óðamannaverk við stórum manngarði. GÍ málverjin tóktist fult og heilt at líta á, at manngarðurin á brotsteigarmarkinum skuldi taka sær av at verja aðra síðuna av málinum. Skotførleikin hjá Rasmusi Nolsøe er so mikið góður, at tað er lítið fyri hann neyvt at lyfta bóltin upp um manngarðin og í meiri ella minni tómu síðuna av málinum. Tað er rættuliga ivasamt, um Rasmus hevði havt sama møguleika at fáa mál, um eingin manngarður var frammanfyri annars stinna GÍ málverjan, sum so kundi havt staðið mitt í málinum.

## B36 kompleks

B36 hevur verið mett sum besta boðið upp á kappingarneyta til HB um meistaraheitið. B36 er framvegis væl fyri, men sunnudagin longdist munurin upp til grannarnar til fimm stig. Enn eina ferð megnaði TB málleysan javnleik ímóti B36, sum harvið hevur mist fýra stig ímóti tvørámonnum. Tað kann fara at vísa seg kostnaðarmikið í síðsta enda.

B36 eigur útsettan dyst á í Vági. Har skulu teir spæla nú mikukvøldið. Hjá B36 er tað alneyðugt at fáa fult burturúr ferðini til Suðuroyar. HB skal mikukvøldið spæla á heimavølli ímóti Skála. Hóast Skála er á heiðursmerkjaplássi, og hóast teir mikukvøldið í síðstu viku vunnu 4-0 á KÍ, so ber tað úr frá gongdini síðstu mongu vikurnar ikki til at rokna við øðrum, enn at HB er favorittur ímóti Skála.

Skála venjarin, Johan Nielsen, undrast yvir, at tað skal vera neyðugt at kroysta skránna so nógv saman í sambandi við Intertoto luttøkuna. Tað er væl skiljandi, at hann ger tað. Skála spældi landskappingardyst mikukvøldið, Intertoto dyst leygardagin, landskappingardyst aftur mikukvøldið, teir skulu á flog hósdagin, og so skulu teir aftur spæla í Intertoto sunnudagin. Tað átti at borið til at lagt í hvussu so er annan av dystunum mitt í viku longri frá altjóða luttøkuni, enn teir eru tað í ár, og enn teir hava verið tað undanfarnu árini. Fyritreytirnar at standa seg í altjóða dystunum átti at verið gjørdar so góðar sum tað á nakran hátt ber til.

## Botnurin

Fyri fyrstu ferð í tveir mánaðir vann VB, tá ið ÍF sunnudagin var í Vági. VB fekk fult á Skála 24. apríl, og síðani hevur talan verið um oyðimarkargongd. Teir hava skift venjara, og tað tóktist vera við til at geva bonus. Fuglfirðingar vóru hjartans fegnir eftir, at tað hevði eydnast at fingið eitt stig á heimavølli ímóti Skála. Í Vági fóru teir heilt á botn, áðrenn teir hálaðu tvey mál innaftur og kanska kunnu nýta tey at styrkja sjálvsálitið, áðrenn teir sunnudagin skulu spæla á heimavølli ímóti B36, sum avgjørt einki hevur ráð at missa.

VB sigurin á ÌF bar við sær, at tað nú er væl styttri frá vágbingum, sum framvegis eru á 10. plássinum, og til liðini, sum eru á 9., 8. 7. og eisini 6. plássinum. KÍ, sum er á sætta plássi, fer í 14. umfarinum sunnudagin at taka ímóti botnliðnum VB. Tað er ikki víst, at VB verður botnlið sunnudagin. Um teir vinna mikukvøldið ímóti B36, so verður botnsessurin latin ÍF. Í 14. umfarinum verður spælt soleiðis. Í annaðkvøld HB-Skála og sunnudagin NSÍ-GÍ, TB-EB/ Streymur, ÍF-B36 og KÍ-VB. Umframt at VB framvegis verður aftast, so eru møguleikar fyri, at svarti per eisini fer at verða latin ÍF, TB, GÍ og KÍ!

# B68 aftur fremstir

**FS Vágar 2004 fekk javnleik á Sandi, og so kundu toftamenn aftur leggja seg á odda í aðru deild**

2. DEILD

*Jákup Mørk*

Tað var einki at ivast í, hvør stóri dysturin um vikuskiftið var í aðru deild. Eftir sigurin hjá B71 á Toftum herfyri, var talan um nýggja styrkisroynd hjá oddaliðnum, tá FSV04 kom á vitjan.

Sæð burtur frá tapinum fyri Royn í fyrsta dystinum á árinum, so hevur tað gingið sum eftir ánni hjá vágalið-num, sum við fleiri sannførandi avrikum hevur ávarað hini um, at teir so sanniliga eisini skulu takast í álvara, tá tosað verður um uppflytingarkandidatar.

Tað var tó skjótt, at B71 setti seg á dystin leygardagin, og longu eftir sjey minuttum høvdu teir lagt seg á odda. Clayton Soares fannHanus Clementsen, og tá hesin royndi seg við skoti, smoygdi bólturin sær inn um stólpan.

B71 yvirvágin helt fram, og teir høvdu fyri steðgin nakrar møguleikar at avgera dystin. Hetta eydnaðist tó ikki, og eftir steðgin vóru tað í fleiri førum gestirnir, sum lógu framvið. Størsta møguleikan fingu teir, tá B71-málskjúttin gjørdi brotsspark, men hetta sendi Birgir Joensen mitt í krovið á málverjanum.

Tað eydnaðist tó at javna, tá Jákup Joensen stútaði hornaspark í kassan. Sandoyingar spældu annars við tíggju monnum seinasta góða hálva tíman, so einki er at siga til, at frøin var stór, tá javnelikurin varð veruleiki.

## B68 aftur fremstir

Aðra staðni kring landið kundu toftamenn staðfesta, at teir aftur eru á oddasessinum í deildini, eftir at B71 tók hendan sessin seinasta vikuskifti.

Hesa ferð vann B68 4-1 í Leirvík, har vertirnir tó góvu in lítlan hvøkk, tá teir minkaðu munin í 1-2. Hóast hetta, so megnaðu toftamenn at vinna hampuliga trygt, men tað mundi minka eitt sindur um gleðina, at spælandi venjarin, Julian Johnsson, tíðliga í dysitnum mátti av vøllinum við skaða í knænum.

Í Sumba fekk B36 sín fyrsta sigur, tá tver skallarar frá Dánjal Petur Johansen og Levi Hanssen vóru nóg mikið til at tryggja ein 2-0 sigur. Royn kom av álvara niður á jørðina aftur, tá teir taptu 6-1 í Gundadali fyri HB, og í Gøtu staðfesti AB, at GÍ ikki skal rokna við tí stóra, tá tikist verður við fremstu liðini í deildini.

## Úrslitini hetta vikuskiftið

| | |
|---|---|
| B71-FSV04 | 1-1 |
| LÍF-B68 | 1-4 |
| HB-Royn | 6-1 |
| Sumba-B36 | 0-2 |
| GÍ-AB | 1-5 |